# FÓLKATINGSVALIÐ 2001



**Thomas Arabo**
Signabøur



**Jóannes Eidesgaard**
Tvøroyri



**Malan Helgadóttir**
Miðvágur



**Sylverius Jacobsen**
Skáli



**Katrin Dahl Jakobsen**
Tórshavn



**Vilhelm Johannesen**
Klaksvík



**Hans Jørgensen**
Miðvágur



**Elin Lindenskov**
Tórshavn



**Gerhard Lognberg**
Skopun



**Kristian Magnussen**
Tórshavn



**Jákup Birgir Mohr**
Sandur



**Gunnvá Mortensen**
Hósvík



**Rasmus Niclasen**
Sørvágur



**Henrik J. F. Old**
Vágur



**Andreas Petersen**
Syðrugøta



**Dan Reinert Petersen**
Fuglafjørður



**Bartal N. Poulsen**
Tórshavn



**Eyðgunn Samuelsen**
Klaksvík



**Hans Pauli Strøm**
Vestmanna

JAVNAÐARFLOKKURIN

# ítróttur

Nr. 223 • leygardagur • 17. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Avtalan staðfest

Tað hevur leingi ligið í luftini, at venjarin hjá KÍ komandi árið fór at verða Kurt Mørkøre. Tað eru longu einir tveir mánaðir síðani, at KÍ boðaði frá, at venjari varð settur, men at navnið á hesum ikki kundi kunngerast. Eftir dystin hjá føroyska landsliðnum í Slovenia váttaði Kurt eisini fyri Sosialinum, at hann var í samráðingum við KÍ.

Fyrst hevur tó verið neyðugt at fingið øll viðurskifti hjá Kurt í rættlag, men nú hevur heimasíðan hjá KÍ so boðað frá, at tað verður lokala hetjan, sum komandi árið skal taka sær av liðnum.

Í fyrsta umfarinum verður talan um ein eittára sáttmála.

**-jm**

# Sivic landsliðsvenjari í Jordan

**Tomislav Sivic skal saman við landsmanninum Branko Smiljanic verða landsliðsvenjari í Jordan**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*



*Úr Føroyum til Jordan. Frá felag til landslið. Tomislav Sivic, sum vandi VB, B36 og KÍ, verður nú landsliðsvenjari í Jordan*

Tá verður eitt fullkomið skift í mentan, fótbóltsumstøðum og samfelag, tá Tomislav Sivic skiftir venjarastørvini í Føroyum út við eitt nýtt starv í Jordan.

Tomislav Sivic og landsmaður hansara Branko Smiljanic skulu venja A-landsliðið og U21 landsliðið hjá Jordan, skriva altjóða internetsíður um fótbólt.

Jordanska fótbóltssambandið vil fegið hava teir at taka við størvunum, og tað verður roknað við, at seinastu lutirnir í avtaluni millum partarnar verða fingnir upp á pláss fyrsta dagin.

Á seinasta styrkislistanum hjá altjóða fótbóltssamgonguni FIFA verður Jordan styrkismett sum nummar 100 av heimsins fótbóltstjóðum. Hetta er á hædd við europeisk lond sum Wales, Norðurírland og Letland. Føroyar verða roknaðar sum nummar 118 á hesum lista.

### Nógv ár í Føroyum

Tomislav Sivic kom til Føroya miðskeiðis í nítiárunum, og hann var í fjør venjari hjá KÍ. Framman undan vandi hann VB og B36. Tá Sivic fór av landinum í oktober, segði hann farvæl til føroyskan fótbólt.

Sivic hevði einaferð sum ambitión at gerast landsliðsvenjari í Føroyum, men hesum máli segði hann seg hava slept, tá hann fór av landinum. Nú gerst hann púra óvæntað landsliðsvenjari í heilt øðrum landi.

### Verið í Svøríki

Komandi starvsfelagin hjá Sivic í Jordan, Branko Smiljanic, hevði seinastu venjarauppgávu sína í jugoslaviska 2. deildarfelagnum Radnicki Obrenovac. Hann fór úr hesum starvi fyri kortum, tí hann gjørdist ósamdur við leiðsluna í felagnum.

Men Smiljanic fekk skjótt nýtt starvstilboð, og hann hevur verið í Jordan fyri at samráðast sáttmálan upp á pláss.

Smiljanic hevur spælt fótbólt í Jugoslavia, og hann spældi eisini seks ár í svenska felagnum Kalmaro. Aftaná tað fór hann undir venjarayrki í Svøríki. Seinastu árini hevur hann tó verið venjari í heimlandinum.

# Favorittar í øllum dystunum

**Allir fýra dystirnir í meistaradeildunum hjá kvinnum og monnum hetta vikuskifti hava favorittar, men sum favorittur skal ein altíð ansa sær. Og tað er eisini galdandi fyri kvinnurnar hjá TB og ÍF og fyri menninar hjá Fram og SÍ**

FLOGBÓLTUR
*Emil L. Jacobsen*

Fimta umfar í meistaradeildunum hjá kvinnum og monnum verður spælt sunnudagin, og hetta er eitt av umførunum, har fleiri av úrslitunum síggja út til at "geva seg sjálvi". Tað er sum kunnugt altíð vandamikið at taka alt ov nógv fyri givið, men flestu dystirnir hava greiðar favorittar.

### Ráð til at missa stig

Hjá kvinnunum tekur TB í sínum triðja heimadysti á rað ímóti Drátti. Fyri TB-kvinnurnar ræður nú mest um at halda dampinum uppi, nú tær hava lagt seg klárt á odda í deildini. Tær vilja neyvan missa stig, og serliga ikki á heimavølli, sjálvt um tær hava ráð til tað. Tað er altíð ein vandi fyri, at ein kann taka sær av løttum, tá alt hevur gingið uppá stás, sum tað hevur gjørt higartil hjá TB, og tað er eisini júst tað, sum kann hjálpa Drátti í morgin. Men uppgávan sær kortini sera møtumikil út. Tá liðini møttust á Giljanesi í fyrsta dystinum í kappingini, vann TB sera trygt 3-0. Sum oftast er tað tó so, at liðini mennast so sum kappingin líður, og Dráttur er ivaleyst eisini betur fyri nú, enn tær vóru fyri einum mánaði síðani. Men tær skulu spæla upp til sítt allarbesta, um tær skulu hótta TB í morgin.

Tað sama skal Fleyr, sum tekur ímóti ÍF. ÍF tykist vera væl fyri í løtuni, og síðsta vikuskifti gjørdu tær tað, sum einki annað lið hevur megnað í kappingini - nevniliga at vinna eitt sett móti TB. Áðrenn tað hevði ÍF eisini vunnið 3-0 móti bæði Fleyr og Mjølni, so ÍF er størsti kappingarneytin hjá TB í løtuni. Fleyr vann herfyri nakað óvæntað móti Drátti, men annars hava tær tapt hvørjaferð, og tað má sigast at vera rættiliga ivasamt, um tær kunnu gera nakað við formsterka ÍF-liðið.

### Fram tapt sett hvørjaferð

Mest áhugaverdi dysturin í hesum umfarinum sær á pappírinum út til at vera tann í Eysturskúlanum millum Fram og Mjølnir. Fram er ovast á stiga-talvuni, men Mjølnir framdi eitt gott avrik móti Fleyr síðsta leygardag, og spurningurin er so, um teir kunnu byggja víðari uppá tað við enn einum sigri í Havn. Í fyrra dystinum, sum hesi bæði liðini spældu í Klaksvík, vann Mjølnir tvey tey fyrstu settini, áðrenn teir mistu luftina og at enda taptu 3-2.

Fram hevur víst styrki higartil í kappingini og hevur fult stigatal, men teir hava tapt sett í øllum dystunum, og tað kann takast sum eitt tekin um, at teir kanska ikki eru heilt so suverenir sum stigatalvan vísir. Men teir verða favorittar í morgin eisini.

Hin favoritturin í hesum umfarinum er kanska lættari at fáa eyga á. SÍ skal spæla á Kambsdali móti ÍF, og hetta er næstfremsta liðið móti niðasta liðnum. Men støðan kann lumpa eitt sindur. Eftir eina sera vánaliga byrjan sær nevniliga út til, at ÍF - sum jú eisini er føroyameistari - so smátt er um at fáa fótin fyri seg. Og fyri eini viku síðani var um reppið, at teir sera, sera óvæntað vunnu móti Fram. Tað gjørdu teir ikki, men tann dystin kundi SÍ brúka sum eina góða ávaring um, at teir neyvan fáa so lætt spæl í morgin, sjálvt um teir eru seks stig frammanfyri ÍF í løtuni.